NORÐOYA SPARIKASSI

# HÁLVÁRSFRÁSØGN 1. HÁLVÁR 2018

NORÐOYA SPARIKASSI

Ósávegur 1
Postboks 149
FO-710 Klaksvík
Tel. 475000
Fax 476000
ns@ns.fo
www.ns.fo

Deildin í Fuglafirði:
Í Støð 7
FO-530 Fuglafjørður
Tel. 475000

Deildin í Tórshavn:
Hoyvíksvegur 67
FO-100 Tórshavn
Tel. 475000
Fax 476015

## Innihaldsyvirlit

| | | |
|---|---|---|
| LEIÐSLUÁTEKNING | s. | 3 |
| HÁLVÁRSFRÁGREIÐING 2018 | s. | 4 |
| RAKSTRARROKNSKAPUR 1. HÁLVÁR 2018 | s. | 7 |
| FÍGGJARJAVNI 30. JUNI 2018 | s. | 8 |
| ÚTGREINING AV EGINPENINGI | s. | 9 |
| SOLVENSUPPGERÐ | s. | 10 |
| LYKLA- OG HØVUÐSTØL | s. | 11 |
| NOTUR | s. | 12 |

# Leiðsluátekning

Nevnd og stjórn hava í dag viðgjørt og góðtikið hálvársfrásøgnina fyri 1. hálvár 2018 fyri Norðoya Sparikassa. Hálvársfrásøgnin er greidd í samsvari við lóg um fíggjarligt virksemi, herundir roknskaparkunngerð frá Fíggjareftirlitinum um fíggjarligar frásagnir hjá kredittstovnum v.m.

Tað er okkara fatan, at hálvársfrásøgnin gevur eina rættvísa mynd av sparikassans ognum, skyldum og fíggjarjavna pr. 30. juni og úrslitinum fyri 1. hálvár 2018.

Hálvársfrásøgnin er ikki grannskoðað.

Klaksvík, hin 19. juli 2018.

Stjórn

Marner Mortensen

Nevnd

| | | |
|---|---|---|
| John P. Danielsen<br>*formaður* | Jóannes Hansen<br>*næstformaður* | Jóhanna á Tjaldrafløtti |
| Karl Heri Joensen | Petur Alberg Lamhauge | Frimodt Rasmussen |
| Guðrið Lava Olsen | Tummas Martin Sólsker | Janus Joensen |

# Hálvársfrágreiðing 2018

## Fyrra hálvár í stuttum

- Avlop eftir skatt 5,0 mió. kr.
- Renting av eginognini eftir skatt 2,2 %
- Útlánini øktust 3,9 %
- Innlánini øktust 2,0 %
- Ábyrgdarfæið øktist 1,7 %
- Útlánsprosentið 84 %
- Gjaldførisyvirdekningurin (§ 152) 157 %
- Solvensurin 19,3 %
- Solvenstørvurin 10,3 %
- Solvensyvirdekningurin 9 %-stig

## Virksemi

Sparikassans virksemi er at veita fíggjarligar tænastur til privat og vinnurekandi viðskiftafólk og almennar stovnar um alt landið. Sparikassin ynskir at veita viðskiftafólkum sínum eitt fjølbroytt úrval av fíggjarligum tænastum og eisini eina holla og professionella ráðgeving.

## Gongdin fyrra hálvár 2018

Úrslitið eftir skatt var eitt avlop á 5,0 mió. kr. samanborið við 8,1 mió. kr. sama tíðarskeið í fjør. Hetta er ein lækking upp á 3,0 mió. kr., ið stavar frá niðurskriving av sparikassans høvuðsbygningi og virðisjavnan av lánsbrøvum. Eginognin rentaði við 2,2 % fyrra hálvár og er nú 228 mió. kr.

Verður sæð burtur frá virðisjavnan og niðurskrivingum av útlánum hevði sparikassin eitt avlop av vanligum rakstri fyrra hálvár upp á 5,8 mió. kr. móti 7,2 mió. kr. sama tíðarskeið árið fyri. Hetta er ein minking í vanliga rakstrinum upp á 1,4 mió. kr., ið stavar frá niðurskriving av sparikassans høvuðsbygningi á 2,7 mió. kr. Um sæð verður burtur frá hesi niðurskriving hevði sparikassin eitt avlop av vanligum rakstri fyrra hálvár upp á 8,5 mió. kr., sum er ein øking upp á 1,3 mió. kr. í mun til sama tíðarskeið árið fyri.

Fíggjareftirlitið var á regluligari eftirlitsvitjan í februar í ár, og fekk sparikassin boð um at niðurskriva fastar ognir við 3,2 mió. kr., herav høvuðsbygningin í Klaksvík við 2,7 mió. kr. Harumframt skuldu útlán niðurskrivast við 1,8 mió. kr. Tilsamans var talan um niðurskrivingar upp á 5 mió. kr., sum ávirka roknskapin fyri fyrra hálvár 2018. Fíggjareftirlitið staðfesti eisini, at sparikassin skal seta fleiri undirnevndir og hava greiðan funktiónsskilnað á øllum økjum. Sparikassin hevur tikið neyðug stig til fáa hesi viðurskifti í rættlag.

Sparikassin hevur sum mál at vera kappingarførur, og hetta sæst eisini aftur í roknskapinum, har út- og innlán øktust ávikavist 3,9 % og 2,0 %. Rentustøðið er framvegis á sera lágum støði, og til at fíggja kappingina um kundarnar hevur sparikassin tillagað innlánsrentuna fyrra hálvár. Meginparturin av hesi tillaging, saman við økta virkseminum hjá sparikassanum, fær ikki fullan virknað fyrr enn í roknskapinum fyri seinna hálvár.

Á umboðsráðsfundinum í apríl í ár samtykti umboðsráðið at renta ábyrgdarpeningin fyri árið 2017 við 5 prosentum. Sparikassans politikkur fyri 2018 er, at árliga rentan á ábyrgdarpeningi framvegis verður 5 prosent. Fyrra hálvár er ábyrgdarpeningurin hækkaður við 0,3 mió. kr., ið svarar til eina øking á 1,7 %.

Gongdin í fyrra hálvári hevur sum heild verið í samsvari við metingar sparikassans burtursæð frá eyka niðurskrivingum í sambandi við vitjan av Fíggjareftirlitinum. Samanumtikið er sparikassin nøgdur við gongdina.

## ROKNSKAPARFRÁGREIÐING

### Netto rentu- og kostnaðarinntøkur

Netto rentu- og kostnaðarinntøkurnar vóru 35,4 mió. kr. í mun til 33,3 mió. kr. sama tíðarskeið í fjør. Tað er ein øking upp á 2,0 mió. kr. Kappingarstøðan og lága rentustøðið leggja trýst á rentuinntøkurnar, men vegna tillaging av rentuútreiðslum, hevur sparikassin økt um netto rentuinntøkurnar við 1,3 mió. kr. Harumframt eru netto kostnaðar- og provisjónsinntøkur hækkaðar við 0,8 mió. kr. í mun til fyrra hálvár 2017.

### Virðisjavnan

Virðisjavnin vísir eitt hall upp á 0,3 mió. kr. sammett við avlop á 1,2 mió. kr. sama tíðarskeið undanfarna ár. Tað er ein lækking á 1,4 mió. kr. Høvuðsorsøkin til hallið er virðisjavnan av lánsbrøvum vegna styttri gildistíð. Virðisjavnin av lánsbrøvum vísti eitt hall á 1,2 mió. kr., meðan virðisjavnin av íløguognum var eitt avlop upp á 0,4 mió. kr. og virðisjavnin av óskrásettum partabrøvum var eitt avlop á 0,4 mió. kr. Sparikassin eigur bert partabrøv í Elektron, SDC og DLR Kredit, ið eru feløg, sum sparikassin samstarvar við.

### Útreiðslur til starvsfólk og fyrisiting

Útreiðslur til starvsfólk og fyrisiting hækkaðu úr 25,8 mió. kr. upp í 26,7 mió. kr. Hækkingin upp á 0,9 mió. kr. stavar frá hægri útreiðslum til lønir og sosialar veitingar, sum øktust við 1,0 mió. kr., meðan útreiðslur til fyrisiting lækkaðu við 0,2 mió. kr. Samlaða talið av ársverkum fyrra hálvár í ár var 43,2 í mun til 42,7 sama tíðarskeið í fjør.

### Aðrar rakstrarútreiðslur

Hesin postur fevnir um gjald til Garantiformuen og Afviklingsformuen, og útgjald úr gávugrunninum. Fyrra hálvár var útgjaldið úr gávugrunninum 31 t.kr., meðan gjaldið til Afviklingsformuen var 53 t.kr. Nýggj skipan fyri innskjótaratrygd og umskipan og avtøku av peningastovnum varð sett í gildi 1. januar í ár.

### Niðurskrivingar

Fyrra hálvár í ár niðurskrivaði sparikassin útlán og ábyrgdir við 0,5 mió. kr. samanborið við 0,3 mió. kr. fyrra hálvár í fjør. Sparikassin hevur framt stórar niðurskrivingar seinastu árini, men gongdin í niðurskrivingum seinasta árið ber boð um, at útlit eru fyri, at niðurskrivingarnar komandi árini fara at verða á einum lægri støði í mun til undanfarin ár.

## FÍGGJARJAVNI

Fíggjarjavnin øktist við 49 mió. kr. 1. hálvár 2018, úr 2.494 mió. kr. og upp í 2.544 mió. kr. Hetta svarar til eina øking upp á 2,0 %. Høvuðsorsøkin til vøksturin í fíggjarjavnanum er økta virksemið hjá sparikassanum, har út- og innlán øktust ávikavist 3,9 % og 2,0 %. Innlánini øktust við 45 mió. kr., úr 2.227 mió. kr. við árslok 2017 og upp í 2.272 mió. kr. 1. hálvár 2018. Útlánini øktust við 66 mió. kr., úr 1.809 mió. kr. við árslok 2017 og upp í 1.875 mió. kr. 1. hálvár 2018.

### Gjaldføri

Gjaldførið hjá sparikassanum er gott. Fyrra hálvár í ár var yvirdekningurin í mun til lógarkravið 157 % samanborið við 168 % við ársenda í fjør. Eftirlitsdiamanturin hjá Fíggjareftirlitinum er broyttur pr. 30. juni 2018 í sambandi við krav til gjaldføri. Nýggja kravið til gjaldføri tekur útgangsstøði í framskriving av LCR í 3 mánaðir og skal vera minst 100 %. Sparikassin hevur uppgjørt hetta lyklatal til 283,9 %.

### Solvensur og solvenstørvur

Solvensurin hjá sparikassanum er góður. Fyrra hálvár í ár var solvensurin 19,3 % í mun til 18,3 % somu tíð í fjør. Kapitalkrøvini verða alsamt herd komandi árini, og sparikassin leggur stóran dent á at bjálva seg enn betri til komandi krøvini.

Solvenstørvurin var uppgjørdur til 10,3 % pr. 1. hálvár 2018 í mun til 9,3 % somu tíð í fjør.

Sostatt hevur sparikassin ein solvensyvirdekning pr. 1. hálvár 2018 upp á 9 % -stig, sum er tað sama sum árið fyri.

## Meting fyri 2018

Fyrra hálvár 2018 var avlopið av vanligum rakstri 8,5 mió. kr., tá ið sæð verður burtur frá niðurskrivingum upp á útlán og virðisjavnan og niðurskriving uppá høvuðsbygning. Inntøkurnar fyri 2. hálvár verða mettar at verða á einum hægri støði enn 1. hálvár, og væntað verður, at tillagingar í rakstrinum 1. hálvár fara at síggjast aftur í rakstrinum 2. hálvár.

Í ársfrásøgnini fyri 2017 varð mett, at úrslitið av vanligum rakstri fyri alt árið 2018 fór at vera eitt avlop upp á umleið 20 mió. kr., tá ið sæð verður burtur frá niðurskrivingum upp á útlán og virðisjavnan. Grundað á kappingarstøðuna og lága rentustøðið, er sparikassin av tí fatan, at úrslitið av vanligum rakstri fyri 2018 verður 18-20 mió. kr., tá sæð verður burtur frá niðurskrivingini av sparikassans høvuðsbygningi.

Í ársfrásøgnini fyri 2017 varð mett, at úrslitið áðrenn skatt fyri alt árið 2018 fór at vera umleið 14 mió. kr. Sparikassin væntar, at úrslitið áðrenn skatt fyri 2018 verður 12-15 mió. kr.

## Eftirlitsdiamanturin

Fíggjareftirlitið setti í 2012 í gildi ein sokallaðan eftirlitsdiamant. Har verða nevnd fimm ávaringartekin, sum kunnu geva ábendingar um, at ein peningastovnur hevur ov høgan váða. Niðanfyri er stutt frágreiðing um, hvussu váði sparikassans er í mun til hesi ávaringartekin.

Samanumtikið er sparikassin væl innanfyri hesi fimm ávaringartekin:

- **Stórir kundar** (20 teir størstu kundarnir tilsamans skulu vera minni enn 175 % av veruliga kjarnukapitalinum): 20 teir størstu kundarnir tilsamans pr. 30. juni 2018 eru uppgjørdir til 142,5 % av veruliga kjarnukapitalinum.
- **Útlánsvøkstur** (skal vera minni enn 20 % um árið): Sparikassin hevði fyrra hálvár 2018 ein útlánsvøkstur upp á 3,9 %.
- **Útlán og ábyrgdir til fastognir** (skulu vera minni enn 25 % av útlánum og ábyrgdum tilsamans): Pr. 30. juni 2018 vóru útlán og ábyrgdir sparikassans til fastognir 7,7 % av samlaðu útlánunum og ábyrgdunum.
- **Fíggingarlutfall** (útlán/arbeiðandi kapitalur minus lánsbrøv við restáramáli undir 1 ár, skal vera minni enn 1): Sparikassin hevur uppgjørt fíggingarlutfallið til 0,7 pr. 30. juni 2018.
- **Lyklatal fyri gjaldføri** (skal vera omanfyri 100 % í 3 mánaðar stresstest): Sparikassin hevur pr. 30. juni 2018 uppgjørt lyklatalið fyri gjaldføri í 3 mánaðar stresstestini til 283,9 %.

## Váðar og váðastýring

Ongar broytingar eru í váða og váðastýring sparikassans. Víst verður til frágreiðingina í ársfrágreiðingini fyri 2017.

## Hendingar eftir roknskapartíðarskeiðið

Eftir at roknskapartíðarskeiðið endaði 30. juni 2018 hava ongar hendingar verið, sum ávirka fíggjarligu gongd sparikassans.

## Óvissur við innrokning og máting

Tær mest týðandi óvissurnar við innrokning og máting eru knýttar at virðisáseting av ognum og niðurskrivingum av útlánum og áogn. Leiðslan metir, at óvissurnar eru á einum støði, sum er nøktandi í mun til hálvársfrásøgnina.

## Nýttur roknskaparháttur

Nýggjar niðurskrivingarreglur vórðu settar í gildi 1. januar 2018, ið taka støði í nýggja roknskaparstandardinum IFRS 9. Við IFRS 9 eru niðurskrivingarreglurnar broyttar til at taka støði í væntaðum tapum í mun til staðfest tap eftir áður galdandi reglunum. Ávirkanin av nýggju niðurskrivingarreglunum var ein lækking í eginognini á 3,5 mió. kr., sum er innroknað í byrjanarjavnan 1. januar 2018. Víst verður til notu 1 í ársfrásøgnini fyri 2017.

# Rakstrarroknskapur 1. hálvár 2018

| Nota | | 1H 2018<br>1.000 DKK | 1H 2017<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| 1 | Rentuinntøkur | 33.094 | 32.973 |
| 2 | Rentuútreiðslur | 2.203 | 3.369 |
| | **Netto rentuinntøkur** | **30.891** | **29.604** |
| | | | |
| | Vinningsbýti av partabrøvum o.ø. | 0 | 0 |
| 3 | Kostnaðar- og provisiónsinntøkur | 4.902 | 3.987 |
| | Útreiðslur til kostnað og provisión | 438 | 275 |
| | **Netto rentu- og kostnaðarinntøkur** | **35.355** | **33.316** |
| | | | |
| 4 | Virðisjavnan av virðisbrøvum, gjaldoyra o.ø. | -255 | 1.167 |
| | Aðrar rakstrarinntøkur | 634 | 430 |
| 5 | Útreiðslur til starvsfólk og fyrisiting | 26.690 | 25.835 |
| | Avskrivingar av ítøkiligum ognum | 3.395 | 720 |
| | Aðrar rakstrarútreiðslur | 84 | 13 |
| 6 | Av- og niðurskrivingar upp á skuldarar, netto | 539 | 282 |
| | **Úrslit áðrenn skatt** | **5.026** | **8.063** |
| | | | |
| | Skattur | 0 | 0 |
| | **Hálvársúrslit** | **5.026** | **8.063** |

# Fíggjarjavni 30. juni 2018

| Nota | | 1H 2018<br>1.000 DKK | 1H 2017<br>1.000 DKK | 2017<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|---|
| | **Ogn** | | | |
| | Kassapeningur og innistandandi uttan uppsøgn í tjóðbankum | 116.392 | 56.047 | 56.377 |
| | Ogn hjá peningastovnum o.ø. | 38.967 | 84.835 | 122.609 |
| | Útlán til amortiserað kostvirði | 1.875.321 | 1.735.089 | 1.809.286 |
| 7 | Lánsbrøv til dagsvirði | 451.487 | 507.144 | 440.125 |
| 7 | Lánsbrøv til amortiseraðan kostprís | 0 | 5.010 | 0 |
| | Partabrøv o.a. | 12.344 | 12.045 | 12.330 |
| | Fastognir íalt | 19.683 | 23.792 | 23.694 |
| | Íløguognir | 7.065 | 8.521 | 8.640 |
| | Fastognir til egna nýtslu | 12.618 | 15.271 | 15.054 |
| | Aðrar materiellar ognir | 7.657 | 7.620 | 7.810 |
| | Útsett skattaáogn | 7.020 | 5.400 | 7.020 |
| | Yvirtiknar ognir | 8.733 | 10.100 | 8.878 |
| | Aðrar ognir | 6.067 | 4.299 | 6.302 |
| | **Ogn tilsamans** | **2.543.671** | **2.451.381** | **2.494.431** |
| | | | | |
| | **Skuld og eginpeningur** | | | |
| | **Skuld** | | | |
| | Skuld til peningastovnar og tjóðbankar | 21 | 282 | 21 |
| | Innlán | 2.271.993 | 2.186.545 | 2.226.817 |
| | Onnur skuld | 15.581 | 18.887 | 12.526 |
| | Tíðaravmarkingar | 302 | 261 | 283 |
| | **Skuld tilsamans** | **2.287.897** | **2.205.975** | **2.239.647** |
| | | | | |
| | **Avsetingar** | | | |
| | Avsetingar til eftirløn o.a. | 1.935 | 2.025 | 1.935 |
| | Avsetingar til tap upp á ábyrgdir | 17 | 93 | 0 |
| | Aðrar avsetingar | 85 | 0 | 0 |
| | **Avsetingar tilsamans** | **2.037** | **2.118** | **1.935** |
| | | | | |
| | **Eftirstillað kapitalinnskot** | **25.500** | **25.500** | **25.500** |
| | | | | |
| | **Eginpeningur** | | | |
| | Ábyrgdarpeningur | 20.135 | 19.580 | 19.806 |
| | Flutt frá undanfarnum árum | 206.177 | 189.746 | 190.145 |
| | Broyting primo niðurskrivingar (IFRS 9) | -3.523 | 0 | 0 |
| | Úrslit eftir skatt | 5.026 | 8.063 | 16.032 |
| | Tilmælt renta av ábyrgdarpeningi | 0 | 0 | 966 |
| | Regulering av rentu av ábyrgdarpeningi | 22 | 0 | 0 |
| | Gávugrunnur | 400 | 400 | 400 |
| | **Eginpeningur tilsamans** | **228.237** | **217.789** | **227.349** |
| | | | | |
| | **Skuld og eginpeningur tilsamans** | **2.543.671** | **2.451.381** | **2.494.431** |

8 Aðrar skyldur

# Útgreining av eginpeningi

| | 1H 2018<br>1.000 DKK | 1H 2017<br>1.000 DKK | 2017<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| **Kapitalflytingar** | | | |
| Ábyrgdarpeningur við ársbyrjan | 19.806 | 18.091 | 18.091 |
| Tilgongd | 932 | 1.536 | 1.824 |
| Frágongd | -603 | -47 | -109 |
| **Ábyrgdarpeningur tilsamans** | **20.135** | **19.580** | **19.806** |
| | | | |
| Flutt avlop við ársbyrjan | 206.177 | 189.746 | 189.746 |
| Broyting primo niðurskrivingar (IFRS 9) | -3.523 | 0 | 0 |
| Flutt frá gávugrunni, brúkt í árinum | 31 | 13 | 400 |
| Flutt úrslit | 5.026 | 8.063 | 16.032 |
| **Flutt avlop tilsamans** | **207.711** | **197.822** | **206.177** |
| | | | |
| Tilmælt renta av ábyrgdarpeningi | 0 | 0 | 966 |
| Regulering av rentu av ábyrgdarpeningi | 22 | 0 | 0 |
| Gávugrunnur | 369 | 387 | 400 |
| **Eginpeningur tilsamans** | **228.237** | **217.789** | **227.349** |

# Solvensuppgerð

| | 1H 2018<br>1.000 DKK | 1H 2017<br>1.000 DKK | 2017<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| Eginpeningur | 228.237 | 217.789 | 227.349 |
| Hálvársúrslit | -5.026 | -8.063 | 0 |
| Tilmælt renta av ábyrgdarpeningi | 0 | 0 | -966 |
| Varislig meting av dagsvirði | -480 | -539 | -471 |
| Aktiverað skattaaktiv | -7.020 | -5.400 | -7.020 |
| Heimild at útgjalda ábyrgdarpening | -1.000 | 0 | 0 |
| **Kjarnukapitalur aftaná frádrøg tilsamans** | **214.711** | **203.787** | **218.892** |
| | | | |
| Eginpeningur | 228.237 | 217.789 | 227.349 |
| Hálvársúrslit | -5.026 | -8.063 | 0 |
| Tilmælt renta av ábyrgdarpeningi | 0 | 0 | -966 |
| Varislig meting av dagsvirði | -480 | -539 | -471 |
| Aktiverað skattaaktiv | -7.020 | -5.400 | -7.020 |
| Heimild at útgjalda ábyrgdarpening | -1.000 | 0 | 0 |
| Ábyrgdarlán | 25.500 | 25.500 | 25.500 |
| **Kapitalgrundarlag aftaná frádrøg tilsamans** | **240.211** | **229.287** | **244.392** |
| | | | |
| Vektað tøl tilsamans | 1.244.583 | 1.254.152 | 1.275.498 |
| Solvensprosent | 19,3 | 18,3 | 19,2 |
| Kjarnukapitalprosent | 17,3 | 16,2 | 17,2 |
| | | | |
| **Uppgerð av solvenstørvi eftir kredittavsetingarháttinum** | | | |
| Kredittváði | 14.456 | 9.434 | 16.211 |
| Marknaðarváði | 3.017 | 3.305 | 3.158 |
| Operationellur váði | 6.223 | 0 | 6.377 |
| Annar váði | 4.826 | 3.097 | 3.515 |
| Lógarkrøv | 99.567 | 100.332 | 102.040 |
| **Solvenstørvur tilsamans** | **128.088** | **116.168** | **131.301** |
| | | | |
| Solvenstørvur (%) | 10,3 | 9,3 | 10,3 |
| Solvensyvirdekningur (%-stig) | 9,0 | 9,0 | 8,9 |
| Solvensyvirdekningur (%) | 87,5 | 97 | 86,1 |

# Lykla- og høvuðstøl

| Lyklatøl | 1H 2018 | 1H 2017 | 1H 2016 | 1H 2015 | 1H 2014 |
|---|---|---|---|---|---|
| Solvensprosent | 19,3 | 18,3 | 18,1 | 18,1 | 18,7 |
| Kjarnukapitalprosent | 17,3 | 16,2 | 16,0 | 15,9 | 16,5 |
| Hálvársrenting av eginpeningi áðrenn skatt | 2,2 | 3,8 | 4,8 | 3,4 | 4,3 |
| Hálvársrenting av eginpeningi aftaná skatt | 2,2 | 3,8 | 4,8 | 3,4 | 4,3 |
| Úrslit fyri hvørja kostnaðarkrónu | 1,2 | 1,3 | 1,4 | 1,2 | 1,3 |
| Rentuváði | 1,9 | 2,8 | 3,3 | 2,9 | 1,7 |
| Gjaldoyrastøða | 0,6 | 0,4 | 0,3 | 0,3 | 0,7 |
| Gjaldoyraváði | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 0,0 |
| Útlán og niðurskrivingar í mun til innlán | 84,3 | 80,9 | 82,4 | 85,0 | 88,0 |
| Gjaldføri yvir lógarinnar kravi | 156,8 | 188,0 | 169,0 | 154,1 | 199,6 |
| Stórir kundar tilsamans í mun til kapitalgrundarlag | 41,8 | 37,7 | 46,3 | 50,0 | 39,5 |
| Akkumulerað niðurskrivingarprosent | 2,0 | 1,8 | 2,0 | 2,6 | 2,8 |
| Taps- og niðurskrivingarprosent í hálvárinum | 0,1 | 0,0 | -0,1 | 0,1 | 0,1 |
| Útlánsvøkstur í hálvárinum | 3,9 | 2,4 | 3,0 | 0,8 | 0,6 |
| Útlán í mun til eginpening | 8,2 | 8,0 | 8,1 | 8,4 | 8,9 |

| Høvuðstøl (1.000 DKK) | 1H 2018 | 1H 2017 | 1H 2016 | 1H 2015 | 1H 2014 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstrarroknskapartøl** | | | | | |
| **Inntøkur** | | | | | |
| Netto rentuinntøkur | 30.891 | 29.604 | 28.660 | 28.408 | 31.060 |
| Netto kostnaðarinntøkur | 4.464 | 3.712 | 3.742 | 4.838 | 3.206 |
| Virðisjavnan | -255 | 1.167 | 2.611 | -70 | 960 |
| Aðrar inntøkur | 634 | 430 | 716 | 861 | 1.173 |
| **Inntøkur íalt** | **35.734** | **34.913** | **35.729** | **34.037** | **36.399** |
| **Útreiðslur** | | | | | |
| Rakstrarútreiðslur o.a. | 30.169 | 26.568 | 25.640 | 26.029 | 26.789 |
| Av- og niðurskrivingar, skuldarar | 539 | 282 | 480 | 1.815 | 2.433 |
| **Útreiðslur íalt** | **30.708** | **26.850** | **26.120** | **27.844** | **29.222** |
| **Úrslit áðrenn skatt** | **5.026** | **8.063** | **9.609** | **6.193** | **7.177** |
| Skattur | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **Úrslit** | **5.026** | **8.063** | **9.609** | **6.193** | **7.177** |
| **Fíggjarjavni** | | | | | |
| Útlán | 1.875.321 | 1.735.089 | 1.645.581 | 1.546.546 | 1.509.603 |
| Virðisbrøv | 463.831 | 524.199 | 476.645 | 221.954 | 207.316 |
| Innlán | 2.271.993 | 2.186.545 | 2.040.194 | 1.868.966 | 1.767.577 |
| Javni | 2.543.671 | 2.451.381 | 2.286.258 | 2.104.188 | 2.012.538 |
| Eginpeningur | 228.237 | 217.788 | 203.612 | 184.320 | 169.082 |
| Ábyrgdir | 73.494 | 59.313 | 69.507 | 52.760 | 49.769 |

# Notur

| Nota | | 1H 2018<br>1.000 DKK | 1H 2017<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| 1 | **Rentuinntøkur** | | |
| | Innistandandi í peningastovnum o.a. | -280 | 11 |
| | Útlán | 32.623 | 31.975 |
| | Lánsbrøv | 992 | 987 |
| | Rentusáttmálar | -240 | 0 |
| | **Rentuinntøkur tilsamans** | **33.094** | **32.973** |
| | | | |
| 2 | **Rentuútreiðslur** | | |
| | Innistandandi hjá peningastovnum | -2 | 119 |
| | Innlán | 1.179 | 2.224 |
| | Eftirstillað kapitalinnskot | 1.026 | 1.026 |
| | **Rentuútreiðslur tilsamans** | **2.203** | **3.369** |
| | | | |
| 3 | **Kostnaðar- og provisiónsinntøkur** | | |
| | Virðisbrøv og goymsla | 39 | 13 |
| | Gjaldstænastur | 1.269 | 1.049 |
| | Lánisakskostnaður | 1.659 | 1.753 |
| | Provisión av ábyrgdum | 683 | 543 |
| | Aðrar kostnaðar- og provisiónsinntøkur | 1.252 | 629 |
| | **Kostnaðar- og provisiónsinntøkur tilsamans** | **4.902** | **3.987** |
| | | | |
| 4 | **Virðisjavnan** | | |
| | Lánsbrøv | -1.197 | 995 |
| | Partabrøv | 371 | 111 |
| | Íløguognir | 425 | 0 |
| | Gjaldoyra | 146 | 61 |
| | **Virðisjavnan tilsamans** | **-255** | **1.167** |
| | | | |
| 5 | **Útreiðslur til starvsfólk og fyrisiting** | | |
| | Løn og samsýning til umboðsráð, nevnd og stjórn | | |
| | Stjórn | 1.089 | 1.065 |
| | Nevnd | 563 | 482 |
| | Umboðsráð | 74 | 83 |
| | **Tilsamans** | **1.726** | **1.630** |
| | | | |
| | **Starvsfólkaútreiðslur** | | |
| | Løn | 10.798 | 10.039 |
| | Eftirløn | 1.934 | 1.733 |
| | Útreiðslur til sosiala trygd | 1.933 | 1.980 |
| | **Tilsamans** | **14.665** | **13.752** |
| | | | |
| | Aðrar fyrisitingarútreiðslur | 10.300 | 10.453 |
| | | | |
| | **Útreiðslur til starvsfólk og fyrisiting tilsamans** | **26.691** | **25.835** |
| | | | |
| | Miðaltal av starvsfólkum, ársverk | 43,2 | 42,7 |

# Notur

| Nota | | 1H 2018<br>1.000 DKK | 1H 2017<br>1.000 DKK | 2017<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|---|
| 6 | **Niðurskrivingar upp á útlán v.m.** | | | |
| | **Niðurskrivingar upp á útlán v.m.** | | | |
| | **Stig 1:** | | | |
| | Niðurskrivingar upp á útlán við ársbyrjan | 2.831 | | |
| | Niðurskrivingar upp á útlán (netto) | 430 | | |
| | Avskrivað, áður niðurskrivað | 0 | | |
| | Niðurskrivingar ultimo | 3.262 | | |
| | **Stig 2:** | | | |
| | Niðurskrivingar upp á útlán við ársbyrjan | 4.381 | | |
| | Niðurskrivingar upp á útlán (netto) | -1.912 | | |
| | Avskrivað, áður niðurskrivað | 0 | | |
| | Niðurskrivingar ultimo | 2.469 | | |
| | **Stig 3:** | | | |
| | Niðurskrivingar upp á útlán við ársbyrjan | 31.209 | | |
| | Niðurskrivingar upp á útlán (netto) | 3.187 | | |
| | Avskrivað, áður niðurskrivað | 0 | | |
| | Niðurskrivingar ultimo | 34.396 | | |
| | **Niðurskrivingar upp á útlán v.m. tilsamans** | **40.126** | **33.361** | **35.580** |
| | **Burturleggingar upp á ábyrgdir v.m.** | | | |
| | **Stig 1:** | | | |
| | Burturleggingar upp á ábyrgdir við ársbyrjan | 27 | | |
| | Burturleggingar upp á ábyrgdir (netto) | -10 | | |
| | Avskrivað, áður burturlagt | 0 | | |
| | Burturleggingar ultimo | 17 | | |
| | **Stig 2:** | | | |
| | Burturleggingar upp á ábyrgdir við ársbyrjan | 0 | | |
| | Burturleggingar upp á ábyrgdir (netto) | 0 | | |
| | Avskrivað, áður burturlagt | 0 | | |
| | Burturleggingar ultimo | 0 | | |
| | **Stig 3:** | | | |
| | Burturleggingar upp á ábyrgdir við ársbyrjan | 0 | | |
| | Burturleggingar upp á ábyrgdir (netto) | 0 | | |
| | Avskrivað, áður burturlagt | 0 | | |
| | Burturleggingar ultimo | 0 | | |
| | **Burturleggingar upp á ábyrgdir v.m. tilsamans** | **17** | **93** | **0** |
| | **Niðurskrivingar upp á fíggjarstovnar v.m.** | | | |
| | **Stig 1:** | | | |
| | Niðurskrivingar upp á fíggjarstovnar v.m. við ársbyrjan | 124 | | |
| | Niðurskrivingar upp á fíggjarstovnar (netto) | -62 | | |
| | Avskrivað, áður niðurskrivað | 0 | | |
| | Niðurskrivingar ultimo | 62 | | |

# Notur

| Nota | | 1H 2018<br>1.000 DKK | 1H 2017<br>1.000 DKK | 2017<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|---|
| 6 | **Niðurskrivingar upp á útlán v.m. (framhald)** | | | |
| | **Stig 2:** | | | |
| | Niðurskrivingar upp á fíggjarstovnar v.m. við ársbyrjan | 530 | | |
| | Niðurskrivingar upp á fíggjarstovnar (netto) | -374 | | |
| | Avskrivað, áður niðurskrivað | 0 | | |
| | Niðurskrivingar ultimo | 156 | | |
| | **Stig 3:** | | | |
| | Niðurskrivingar upp á fíggjarstovnar v.m. við ársbyrjan | 0 | | |
| | Niðurskrivingar upp á fíggjarstovnar (netto) | 0 | | |
| | Avskrivað, áður niðurskrivað | 0 | | |
| | Niðurskrivingar ultimo | 0 | | |
| | **Niðurskrivingar upp á fíggjarstovnar v.m. tilsamans** | **218** | **0** | **0** |
| | **Niðurskrivingar og burturleggingar tilsamans** | **40.362** | **33.454** | **35.580** |
| | **Samanseting til rakstrarroknskapin** | | | |
| | Niðurskrivingar upp á útlán netto | 1.705 | | |
| | Burturleggingar upp á ábyrgdir netto | -10 | | |
| | Niðurskrivingar upp á fíggjarstovnar netto | -436 | | |
| | Staðfest tap í árinum, ið ikki áður eru niðurskrivaði | 107 | | |
| | Inngoldið til áður avskrivaði krøv | -90 | | |
| | Niðurskrivingar av yvirtiknum ognum | -43 | | |
| | Renta av niðurskrivingum | -695 | | |
| | **Niðurskrivingar og burturleggingar til rakstrarroknskapin tilsamans** | **539** | **282** | **3.166** |

Grundað á broytingar í nýttum roknskaparhátti í sambandi við uppgerð av niðurskrivingum upp á útlán v.m., er bert møguligt at seta upp samanberingstøl fyri samlaða bólkin av niðurskrivingum/burturleggingum upp á útlán, ábyrgdir og fíggjarstovnar.

| Nota | | 1H 2018 | 1H 2017 | 2017 |
|---|---|---|---|---|
| 7 | **Lánsbrøv** | | | |
| | Skrásett á keypsskálum - dagsvirði | 451.487 | 507.144 | 440.125 |
| | Skrásett á keypsskálum – amortiserað til kostprís | 0 | 5.010 | 0 |
| | **Lánsbrøv tilsamans** | **451.487** | **512.154** | **440.125** |
| | Munur á amortiseraðum kostprísi og dagsvirði | 0 | 22 | 0 |
| | **Lánsbrøv til dagsvirði tilsamans** | **451.487** | **512.176** | **440.125** |
| 8 | **Aðrar skyldur uttan fyri javnan** | | | |
| | Fíggjarábyrgdir | 11.252 | 6.564 | 6.564 |
| | Tapsábyrgdir | 10.569 | 9.044 | 10.270 |
| | Aðrar skyldir | 51.673 | 43.705 | 49.042 |
| | **Aðrar skyldir uttan fyri javnan tilsamans** | **73.494** | **59.313** | **65.876** |

www.ns.fo